# Djarvt sín hyrning upp hann rísur

**Nú fjøllini eru gingin, og liðugt mestsum er at fletta, verður tað, sum slept og gjørt er upp, sýnað, mett og kannað. Virðislønir verða givnar, og veitslur hildnar víða hvar í landinum**



*Brundseyðirnir, sum sýnaðir verða í ár, verða ikki minni mettir og handlaðir, tá teir næsta heyst koma aftur sum fullvaksnir veðrar*
*Mydn: Edvard Joensen*

SEYÐASÝNING
*Edvard Joensen*

Seyðasýning verður á Eiði leygardagin. Brundseyðir úr øllum hagapørtum verða sýnaðir, og virðislønir latnar. Bæði eigarum og røktingarmonnum, eins og tann hagaparturin, sum í meðal eigur bestu seyðirnar, eisini fær eina viðurkenning. Alt tiltakið endar við veitslu og dansi um kvøldið.

Hetta er fjórða tiltakið av hesum slagnum, greiðir Olaf í Garði Joensen,, ið er ein fyrireikari, frá. Tað byrjaði í 1994 og var so annaðhvørt ár. Men nú er gjørt av at hava tiltakið triðja hvørt ár. Tá gerst líkasum betri møguleiki fyri at spjaða luttøkuna eitt sinur. Eitt nú er tað so, at onkur eigur hálvmørk og fær brundseyð annaðhvørt ár. Soleiðis verður hann annaðhvørt við hvørja ferð ella ongantíð, um sýningarnar eru annaðhvørt ár, sigur Olaf í Garði.

Tiltakð í ár byrjar leygardagin klokkan 13.00 Uppi á Grind. Tá fara royndir sýnsmenn at sýna brundseyðirnar, og tá avtornar, fara so tríggir at standa eftir, sum fá úrvalspremiu, greiðir Olaf frá. Klokkan 15 verður kaffi at fáa við pannukøkum afturvið.

»Prúdlig sjón er á at líta! Eyglitti væl høvur ber, væl mær líkist á hin hvíta, grái størst av øllum er«, yrkir Mikkjal á Ryggi um veðrarnar.

Alt tiltakið verður mett sum eitt mentanartiltak, og hildið verður á út á kvøldið við vetslu í EB húsinum. Sonevndari fjallmannaveitslu, og seinni aftur verður almennur dansur.

Vanliga hava einir 80 - 100 mans verið á veitslunum, sum veirð hava, greiðir Olaf í Garði Joensen frá. Og tað eru bara menn. Konurnar hava líkasum latið hetta yvir til teirra, og tað kann eisini vera nokk so stuttligt, flennir hann.

– Sært tú. Nógvar røður verða hildnar, og nógv stuttligt sagt. Og eingin fær nakran alboga í síðuna, meðan hann talar, nú konan ikki er við.

Men álvara er sanniliga eisini við, og sungið plagar at verða dúgliga. Bæði lættir sangir til slíkt høvi, eins og eisini sálmar og yrkingar við álvarsamari innihaldi. Kendar yrkingar sum »Nú hvítna tindar« og »Boðar tú til allar tjóðir« eru fast á skránni.

Sámal í Skorini, studentaskúlarektari, sum býr á Eiði, verður orðstýrari, greiðir Olaf í Garði Joensen frá. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við búnaðarmálum, er boðin við, men í skrivandi stund er ikki greitt, um hann kemur.

Eftir veitsluna verður so almennur dansur, har víkarmenn fara at spæla. Tekningarlisti til veitsluna liggur í handlinum hjá Oliver Øster, siga fyrireikararnir.

# Maersk Air í jólahýri

**Um orsøkin til jólahýrin hjá Maersk Air er, at jólamaðurin hevur skift flúgvandi sletuna út við flogfarið hjá Maersk Air, sigur søgan einki um, men Maersk Air boðar í tíðindaskrivi frá trimum ymsum jólatilboðum umframt eini nýggjari lufthavnsrutu í Danmark**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Maersk Air letur jóltatilboð á rutunum millum Føroyar og Danmark. Spælikapping er í donskum sjónvarpi, har til ber at vinna ferðir við Maersk Air. Til ber at keypa gávukort til flogferðaseðlar hjá felagnum, eins og skipað verður fyri nýggjari lufthavnsrutu í Jyllandi.

Síðan fríggjadagin 18. oktober hevur verið møguligt at keypt bíligar ferðaseðlar á rutunum hjá Maersk Air millum Føroyar og Danmark.

Prísurin millum Vágar og Billund er kr. 1.993,- meðan hann millum Vágar og Kastrup er 1.955,-.

Men tað fylgja ávísar treytir við kortini, um ein ætlar sær bíliga til Danmarkar at ferðast undan jólum, ella at halda jól í Danmark.

Tíðin, til ber at ferðast bíliga millum londini, er millum 10. december og fimta januar næsta ár. Ferðaseðilin skal vera keyptur i seinasta lagi sjey dagar, áðrenn farið verður avstað, og tann ferðandi skal í minsta lagi vera burtur sunnunátt, men kann í mesta lagi vera burtur í 21 dagar. Einki endurgjald verður givið, um ein av einihvørji orsøk ikki fær nýtt ferðaseðilin kortini. Heldur ikki kann ferðaseðilin broytast ella býtast um.

Barnafrádráttur er at fáa á hesum ferðunum. Børn millum tvey og ellivu ár fáa 33 prosent í frádrátti. Børn, sum eru yngri enn eitt ár, fáa 33 prosent í avslátti, um tey hava egið setur, meðan frádrátturin er heili 90 prosent, um einki setur er.

## Gávukort og bussur

Maersk Air sigur eisini í tíðindaskrivinum, sent er út um dagarnar, at nú ber til at keypa gávukort til feðraseðlar hjá felagnum.

*Maersk Air letur aftur avsláttur á ferðum millum Føroyar og Danmark*

Tað er ikki neyðugt at keypa ein fullan feðraseðil, um ein ynskir at lata onkrum ein flúgvandi jólagávu. Til ber eisini at fáa gávubræv, sum er partur av ferðaseðlinum, um ein hevur hug til tess, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Fyri fólk, sum búgva í Jyllandi, serliga í Århus og har á leið, er áhugavert, at Maersk Air setir ein eyka lufthavnsbuss í rutu millum Århus og Billund, nú vetrarferðaætlanin kemur í gildi.

Galdandi frá 27. oktober ber nú til hjá teimum, sum skulu vera tíðliga á flogvøllinum í Billund, at fara við bussi úr Århus longu klokkan 04.30 á morgni og vera í Billund klokkan fimm minuttir í seks.

## Virðislønarveiða

Mánadagin byrjaði heilt nýtt tiltak, sum Maersk Air og TV Danmark 2 standa fyri. Talan er um eina sonevnda virðislønarveiðu, har ein, við at fylgja við sendingunum hjá TV Danmark 2, kann vera við í lutakasti um spennandi ferðavirðislønir frá Maersk Air.




Tað ræður um at halda eyga við fýra ymsum figurum hjá TV Danmark 2. Jesper, Berthel, Heidi og Casper, siga tey, at teir eita.

Tá tú so sært ein teirra á skíggjanum, er at vera kvikur og senda SMS ella ringja til telefonnummarið, sum vist verður á skíggjanum.

Hvønn dag verða lutað burtur ein ferð fyri tvey á nýggju rutunum hjá Maersk Air millum Kastrup og Barcelona ella millum Billund og München, sigur Maersk Air í tíðindaskrivinum, sent er út um dagarnar.

Nágreiniligari fæst at vita á heimasíðuni hjá Maersk Air, sum er www.maersk-air.dk



Statoilstjóri aftaná Hessboring:

# Eitt stórt arbeiði liggur fyri framman

**-Eg hevði verið kløkkur, um teir eftir bara ein avmarkingarbrunn høvdu kunnað svarað spurninginum, um Marjunfundið í fjør er rakstrarverdugt. Tað hevði verið sera bjartskygt sigur Statoilstjórin, sum viðgongur, at tað liggur eitt stórt arbeiði fyri framman fyri at skilja jarðfrøðina í øllum økinum**

OLJULEITING
*Jan Müller*

- Enn hava vit fáar upplýsingar at halda okkum til. Vit hava bara tíðindaskrivið, sum ikki sigur so nógv. Men vit fara at royna at útvega okkum data um brunnin og úrslitið av boringini og brúka tað í okkara framtíðar kanningum og samanbera við tilfar og data vit longu hava. Hetta sigur Rúni Hansen, stjóri í Statoil og hann, sum stendur á odda fyri oljuleitingini við Føroyar í eini viðmerking til úrslitið av tí seinastu boringini hjá Amerda Hess oø. á bretskum øki.

Hann vil sjálvandi ikki og og kann heldur ikki gera viðmerkingar til ein brunn, sum onnur feløg hava borað, men staðfestir út frá fleiri av boringunum, sum hava verið gjørdar, at vit hava eina virkna oljuskipan í økinum men at tað krevur meira arbeiði til at finna út av, hvussu jarðfrøðin sær út. Uppgávan hjá jarðfrøðingunum er so at finna tann rætta samanhangin í hesi skipanini, um og hvar oljan er likin og hvussu stætt er við reservoiri, lofti og øðrum týðandi fortreytum fyri at kunna gera rakstrarverdug fund.

Fyri Statoilstjóran er tað eingin ivi um, at tað liggur eitt stórt arbeiði fyri framman.

Um onkur fer at tveita handklæðið í ringin, nú enn ein boring ikki hevur staðfest lønandi fund, vil hann ikki úttala seg um.

- Men eg hevði verið kløkkur, um teir eftir bara ein avmarkingarbrunn høvdu kunnað svarað spurninginum um Marjunfundið í fjør er rakstrarverdugt. Tað hevði verið sera bjartskygt.

Rúni Hansen vísir á, at hevði brunnurin verið testaður, so vistu teir eisini meira. Men feløgini hava

*Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil heldur ikki, at feløg fara at taka seg úr leitingini við Føroyar eftir úrslitið frá Hessboringini. Hinvegin dugur hann ikki at meta um, hvørjar psykologiskar avleiðingar hetta kann fáa.*



so tikið avgerðina um ikki at testa brunnin, og hvat liggur aftanfyri, hvussu nógv olja var í osfr. tað vita vit ikki. Men tað er so tað sum Statoil fegið vil hava meira at vita um og brúka í kanningunum í framtíðini.

Statoilstjórin viðgongur, at tá tað er talan um at leita eftir olju og gassi í einum nýggjum øki sum við Føroyar, so ræður um at vera nokk so úthaldandi. Men hetta er partur av oljuleitingingi, hvar tú enn er stæddur í heiminum. Onkunstaðni er tú hepnari við at finna rætta svarið skjótari og øvugt. Hann loyvir sær tó at ivast í, um nakað oljufelag út frá brunnunum, sum higartil eru boraðir, fer at royna at sleppa sær úr aftur økinum.

- Men hvønn psykologiskan týdning hetta seinasta úrslitið kann fáa veit eg ikki. Vit fara sum sagt at fáa hendur á tilfarinum at brúka í okkara framtíðar arbeiði við økinum.

Rúni Hansen sigur víðari, at tað er ringt at siga, hvat øll hini feløgini hugsa og um tey taka hetta sum eitt afturstig. Sjálvur heldur hann tað vera alt ov tíðliga at siga, at hetta er eitt afturstig. Til tess má man hava meiri vitan um brunnin.

Statoil og Amerada Hess hava skotið nýggjan 3D seismikk í summar, og tulkingin av hesum fer at fáa stóran týdning fyri víðari gongdina. Brúk er sum er fyri fleiri upplýsingum um økið og tíð til at viðgera og tulka hesar upplýsingar.

# Elttør ikki mist trúnna

**-Vit høvdu vónað, at henda seinasta boringin fór at verða eitt sindur meira positiv, men úrslitið vísir, at tað er ikki so lætt at lesa jarðfrøðina. Vit mugu brynja okkum við toli og vóna, at restin av boringunum fara at geva eitt gott úrslit sigur Eyðun Elttør, sum als ikki hevur mist trúnna uppá, at olja verður funnin í rakstrarverdugum nøgdum**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum hevur stórar vónir til teir fimm brunnarnar, sum eru eftir at bora á landgrunninum*

-Vit skulu bora fimm brunnar aftrat í okkara øki og tann fyrsti av teimum verður tann hjá Agip næsta ár, so vónirnar um at finna olju í rakstrarverdugum nøgdum er á ongan hátt burtur. Tað sigur ein framhaldandi bjartskygdur men tó realistiskur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum eftir seinastu boringina hjá The Faroes Partnership í bretskum øki.

Tað hevur verið róð framundir, at oljufeløg møguliga vilja sleppa sær úr bindingunum tey hava við føroyskar myndugleikar um at bora ávíst tal av brunnum, nú enn ein boring ikki hevur víst rakstrarverdugar nøgdir av olju. Fyri Eyðun Elttør er hetta eingin trupulleiki. Hann sær onga orsøk til ikki at bora allar hesar brunnarnar, tí tað vit hava áhuga í er at fáa betri kunnleika til jarðfrøði Føroya og tað er út frá tí, at loyvi eru givin oljufeløgunum. - Vit hava jú bjóðað út fyri at kunna staðfesta olju sigur hann. Oljumálaráðharrin hevur als ongan varhuga av, at feløg vilja sleppa úr sínum boriforpliktilsum.

Eyðun Elttør sigur, at tey høvdu vónað, at henda seinasta boringin fór at verða eitt sindur meira positiv, men úrslitið vísir, at tað er ikki so lætt at lesa jarðfrøðina. Vit mugu brynja okkum við toli og vóna, at restin av boringunum fara at geva eitt gott úrslit.

- Hevði tú roknað við, at tað tók so drúgva tíð at staðfesta oljufund?

- Eftir tí eg havi lært av royndunum aðrastaðni, so haldi eg ikki vit skulu klaga. Tey hevði verið gott at rakt við beinavnegin, men tað er als einki løgið í tí, at vit ikki gera tað. Tað tekur so ikki mótið frá mær. Bert fáir brunnar eru boraðir og fleiri koma. Vit hava staðfest, at her er ein virkin oljuskipan. So skulu vit bara víðari og finna fram til, hvar rætta staðið er at sera framríðar borarnar í. Ein og hvør boring, sum verður gjørd, gevur okkum eina betri fatan av jarðfrøðini og hvussu undirgrundin sær út.

Tá talan er um framtíðina, so verður eisini spurt í oljuverðini, nær Oljumálaráðið fer at leggja til brots við tí næstu útbjóðingini

Eyðun Elttør hyggur alla tíðina eftir møguleikanum fyri eini nýggjari útbjóðing og er vitandi um, at feløgini eru áhugað í eini slíkari. Hann vil tó ikki siga nakað við vissu, nær teir fara at bjóða út aftur.

Men hann vísir á, at brunnarnir, sum verða boraðir í bretskum øki tætt við markið, kunnu allir geva okkum týðandi upplýsingar, sum so aftur kunnu vera brúktir sum grundarlag undir eini komandi útbjóðing. Her vísir hann eisini til tað áhugaverdu boring, sum júst er farin í gongd norðari á bretskum øki, skamt frá markinum. Tað er Cambobrunnurin, sum Amerada Hess og onnur feløg bora. Oljufeløgini, sum hava leitiloyvi á landgrunninum, fylgja hesi boring við stórum áhuga.